Sosialurin

Nr. 239 • týsdagur • 13. desember 2005 • 79. árgangur • Kr. 13,00

www.sosialurin.fo

## 40 dagar í geglið fyri at koyra kapp

Síða 7





Atlantic Navigator:

### Døgurðin ein heilur høsnagarður

síða 20-21



Viðingar:

### Ynskja tryggari vegasamband

síða 8-9



### Meira tíðarparkering í Havn

síða 7




# Rúni hevur samráðst fyri 100 milliardir kr

**Rúni Bro Róin er 32 ára gamal og úr Hoyvík. Hann hevur higartil luttikið í samráðingum fyri 100 milliardir krónur. Í starvinum sum Head Of Corporate Finance hjá DONG situr Rúni við ábyrgd fyri strategisku skipanini av einum av størstu íløgufíggjarætlanunum í Danmark**

Vinnusíður 16-17

AUTO
311234



Dag og nátt - Alt dognið
AUTO
TEL 311234
IF YOU WANT A TAXI

Akkumulatorar
- til øll endamál



Fønix
Tel 31 16 31 · Fax 31 16 51

LJÓÐ- & LJÓS
-Brúdleyp -Jólaveitslur
-Føðingardagar -Skúlaveitslur
-Mótasýningar -Merkisdagar
-Dansitiltøk -Sjónleikir
-Konsertir -Móttøkur
-Messur -og mangt annað
Leiga anlegg til smærri tiltøk
Prísir úr-
1.300,-
-ÚTGERÐ TIL ØLL ENDAMÁL-
-TEL. 266 829-

Hvat ynskir tú tær innast inni?



Medima
SIRI LINGERI
DR. JACOBSENSGØTA 18
FO 100 TÓRSHAVN
TEL 316610 · FAX 316610

GÓLV
Parkettgólv:



14 mm eik og ask
10 mm eik

Laminat:



Klikk gólv, fleiri sløg

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60
Fax 44 84 60 · www.klementpetersen.fo
pf Klement Petersen

VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 239 • týsdagur • 13. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rúni hevur samráðst fyri 1

**Rúni Bro Róin er 32 ára gamal úr Hoyvík. Hann hevur higartil luttikið í samráðingum fyri 100 milliardir. Í starvinum sum stjóri fyri íløgufígging hjá DONG situr Rúni, við ábyrgd fyri strategisku skipanini av einum av teimum størstu íløgufíggjarætlanunum í Danmark**

FØROYINGAR Í DANMARK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eg hitti Rúna Bro Róin á høvuðsskrivstovuni hjá DONG í Hørsholm stutt uttan fyri Keypmannahavn. Hann var fryntligur og bjóðaði mær ein góðan bita á skrivstovuni hjá sær, meðan vit prátaðu um starvið sum Head Of Co í DONG, um fyritøkuna og um Rúna sjálvan. Hann leggur fyri við at siga, at hetta er hann, ið úttalar seg vegna Rúna ikki vegna DONG.

DONG er ein risafyritøka, ið hevur Norður Atlantshavið sum eitt av sínum fremstu arbeiðsøkjum, tí ynskir stjórin fyri íløgufígging sjálvandi ikki, at eitt prát við hann skal tolkast, sum almenni politikkurin hjá DONG.

## Læs økonomi

Rúni vaks upp í Hoyvík, gekk í Hoyvíkar skúla og fór síðan í student í Hoydølum. 20 ára gamal fór hann til Århus at lesa búskap.Her gekk sera væl. Á hvørjum ári sendir Århus Universitet seks fólk til Cranfield School Of Management í Onglandi at luttaka í eini eitt árs MBA útbúgving. Tú sleppur at taka tann kreativa helminingin av MBA'ini. Tann teoretiska partin fært tú góðskrivaðan fyri lesturin í Århus. Rúni søkti luttøku og varð valdur út av universitetinum at fara til London. Hetta hevur nógv at týða fyri starvsmøguleikar í summum londum, sigur Rúni.

Afturkomin til Århus gjørdi hann útbúgvingina í búskapi lidna innan fyri tey ætlaðu fimm árini.

## Í starv hjá TDC

Eftir lokna útbúgving varð hann settur í starv hjá danska telerisanum TDC í Keypmannahavn. Har arbeiddi hann við búskaparligari greining. Men eftir hálvt annað ár hjá TDC, var hann vorðin deildarleiðari. Hann varð verðandi hjá TDC í fýra ár og fekk har royndir við at arbeiða við stórum íløguætlanum. Saman við DONG er TDC ein av teimum fyritøkunum við størstu íløgufíggjarætlaninini í Danmark.

## Headhuntaður

Í 2001 kom fyrrverandi stjórin í danska fíggjarmálaráðnum Anders Eldrup í starv sum stjóri í DONG. Hetta hevði stórar umskipanir í fyritøkuni við sær. Í hesum sambandi varð leitað eftir best egnaðu fólkunum. DONG brúkar sokallaða headhunting, har teir velja best egnaðu fólkini til leys størv og bjóða teimum tey. Sum skilst stóð navnið hjá Rúna á listanum, og hann varð settur í starv við projektleiðslu. Hann fór sostatt úr einum starvið við beinleiðis leiðslu til eitt starv projektleiðslu. Hann gjørdist tó heilt skjótt deildarleiðari í DONG.

## 100 milliardir

Rúni Bro Róin er nú 32 ára gamal. Hann hevur higartil luttikið í samráðingum fyri 100 milliardir, nakrar av samráðingunum eru enn ikki endaliga gjøgnumførdar, men nógvar eru. Størsti einstaki sáttmálin hann hevur samráðst um, var áljóðandi 24 milliardir.. Eg spurdi hann, um peningur ikki missir sítt virði, tá man arbeiðir við so stórum upphæddum. Men tað helt hann ikki "Peningur fær bara ymisk virði. Um tú samráðist um ein sáttmála, sum er 24 milliardir, so hevur peningurin eitt virði, er sáttmálin um eina millión, hevur peningurin eitt annað virði, og tá eg komi til hús, hevur hann eitt heilt triðja virði.", sigur Rúni. Hann heldur tó, at tað er áhugavert, tá tú samráðist um stóru sáttmálarnar, at tú kanst uttan himpr biðja 100-200 fólk koma til arbeiðis, ella fara út og keypa júst tann rætta serfrøðingin til onkra uppgávu.



## Situr við samráðingarborðið

DONG byrjaði fyrst í 1980'unum sum danskt olju- og gassfelag, men virksemið er alsamt vaksið hesi árini, og við íløgum og yvirtøkum bæði í Danmark og í útlandinum er felagið, ið danski staturin eigur, vorðið ein risi, ið millum annað eigur stórar partar av danska elkervinum, stór olju- og gassøki í bæði donskum og útlendskum havøki, umframt nógv annað virksemi innan orku. Felagið hevur skrivstovur í Danmark, Noregi, Svørríki, Týskland, Hollandi og Stóra Bretlandi. Rúni spælir ein virknan leiklut í yvirtøkunum. Deildin hjá honum tekur sær av fíggjarliga partinum og av strategi. Rúni

# 100 milliardir



situr ofta sjálvur við samráðingarborðið, onkuntíð sum samráðingarleiðari, onkuntíð aftan fyri í øðrum leiklutum.

Rúni greiðir frá at munur er á hvussu langa tíð ymisku transaktiónirar taka. Her eru tíðarskeið frá einari viku og upp í trý ár. Starvið er altíð avbjóðandi, men størta avbjóðingin er ivaleyst at halda tann góða hugburðin, tá tú situr og samráðist á triðja ári.

### Úr jólafrítíð til arbeiðis

Rúni arbeiðir nógv, kanska

*Tá tú samráðist um sáttmálar, ið eru áljóðandi 24 milliardir, tá ber til at fáa 100-200 starvsfólk til arbeiðis um tørvur er á tí.", sigur Rúni Bro Róin.*

ov nógv viðgongur hann, og ferðin er altíð høg. Eg havi upplivað at verða kallaður til Danmarkar úr jólafrítíð í Føroyum, og at verða vaktur mitt um náttina, tí okkurt er áfatt. Men hinvegin kann hann halda ein frídag um hann hevur hug til tað. Í næstum fer hann t.d. tríggjar vikur til Brasilia at ferðast..

### Karate gevur frið

Umframt starvið í DONG roynir hann at menna sín leiðsluførleika við at taka ein útbúgving innan leiðslu. Men alíkavæl sær hann nógv til vinfólkini og er í biograf upp fleiri ferðir um vikuna. Men hóast ferðin er høg, kennir hann ikki nógv til strongd. Hann greiðir frá, at lykilin til hetta er Karate. Tá hann flutti til Keypmannahavnar byrjaði hann at ganga til Karate á Nørrebrogade. Hann gongur nú tríggjar ferðir um vikuna í einum av teimum mest síðbundu karatefeløgunum í Danmark. Har fyrigongur alt á japanskum, tú situr lágt og bukkar fyri hvør øðrum. "Tá tú ert til Karate, noyðist tú at vera til staðar, um tú gongur og hugsar um okkurt annað, so er avrokningin kontant.", sigur Rúni. Hetta hjálpir honum við at skapa javnvág í gerandisdegnum.

### Donsk vinfólk

Rúni býr á Christianshavn eitt hanagleiv frá Norður Atlantsbryggjuni, og Bryggjan er hansara samband við føroyska útisetasamfelagið. Flestu vinfólkini eru danir, og føroysku vinfólkini eru antin í Føroyum ella í Noregi. Men hann plagar onkuntíð at fara til tiltøk á Bryggjuni. T.d. hjálpti hann til, tá ólavsøkan varð hátíðarhildin. Hetta helt hann vera sera stuttligt. Hann heldur orsøkina vera, at hann læs í Århus og flutti síðan til Keypmannahavnar. Tá flutti hann frá teimum føroyingunum, ið hann kendi har.

Hann heldur annars sambandið við føroysku røturnar við at ferðast heim til Føroyar so ofta, ið til ber.

### Áhugamál í Føroyum

DONG er eitt virkið við nógvum áhugamálum í Føroyum, og sum hevur Føroyar í sínum framtíðarætlanum. Men hetta er ikki eitt øki, ið Rúni fæst við dagligt. Men honum dámar væl at arbeiða á einum virkið, ið hevur við Føroyar at gera, og hetta ger sjálvandi, at tað er møguligt, at hann í framtíðini fer at hava okkurt við Føroyar at gera.

### Droymdi um hetta í 1.G

Rúni er í einum av hægstu størvunum í Danmark innan sítt øki, men hann heldur ikki, at hann er komin á mál enn. "Hetta er akkurát tað, ið eg droymdi um, tá eg gekk í 1.G. Men eg dugi at síggja nógvar avbjóðingar enn. Eg eri ikki bundin at Danmark, og heimurin er stórur.", sigur hann. Men hann heldur, at enn eru nógvar spennandi avbjóðingar í DONG, millum annað størsta danska børsnoteringin nakrantíð, tá danski staturin fer at lata partabrøv í DONG til sølu.

Rúni ivast í, um hann nakrantíð flytir til Føroyar aftur. Hann sær ikki sum nú nakrar nóg spennandi yrkisligar avbjóðingar. Men samstundis, so er hann greiður yvir, at hetta kann broyta seg. Hann kennur nógv, ið hava sagt, at tey ongantíð flyta heim aftur, men síðan eru flutt heim og stórtrívast.

## Betri gjaldføri hjá Landskassanum

Miðal nettoinnistandandi hjá Landskassanum í Landsbankanum øktist aftur í november mánaði.

Miðal innistandandi var í november mánaði 1.713 mió kr., og er hetta 213 mió kr. meira enn kravda minstainnlánið. Eitt skifti í ár hevur innlánið verið væl minni enn minstainnlánið, men sveiggini ígjøgnum árið viðføra ofta, at gjaldførið gerst væl betur móti ársenda. Millum annað tí partafelagsskattur verður goldin seinastu tríggjar mánaðirnar í árinum.

Sveiggini í november mánaði hava tó verið stór. Umfígging av lánsbrøvum hevur staðið á skránni, og tann 24. november vórðu lán afturgoldin, soleiðis at innistandandi ultimo november var gott og væl 1.300 mió kr.

Samlaða brævalánið hjá Landskassanum er nú 3.074 mió kr. Hetta er meira enn tvífalt so nógv, sum tað var fram til juni mánað í ár.

**-mørk**




*Talvan vísir, hvussu gjaldførið hjá Landskassanum hevur verið síðani 1995*

## Strongdir jólamenn

### Mannfólk eru eins strongd av jólainnkeypi sum flogskiparar á stríðsflogfari

STRONGD
*www.business-line.fo*

Strongd mannfólk eru í vanda fyri hjartatilburðum og øðrum álvarsligum sjúkum, um teir renna runt í handlunum beint áðrenn jól, skrivar týska blaðið Bild am Sonntag.

Hjartað slær títtari og blóðtrýstið hækkar nógv, tá menninir beint áðrenn jól reika úr handli í handil at keypa gávur til síni kæru.

Ein kanning av 40 kvinnum og monnum við sama innkeypslista vísti, at bara fjórða hvør kvinna vísti tekin um strongd. Men hjá monnum øktist strongdin til tað sama sum hjá flogskiparum á stríðsflogfari.

Kanningin vísti, at hjá 70% av monnunum var strongdin longu byrjað, áðrenn teir byrjaðu sítt jólainnkeyp. Teir gjørdist v.ø.o. strongdir av tankanum um, at skula út at keypa jólagávur, skulu vit trúgva týsku kanningini, kunngjørd í Bild am Sonntag.